# HEILSANIR




**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum 14. mars. Takk fyri tað sum tú og abbi eru fyri okkum øll. Muss og klemm.
**Heilsan ommubørnini**



**Góða Rebekka**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Vit elska teg.
**Heilsan fastir og gubbi**



Leygardagin 18. mars, kl. 14 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Siri Heradóttir av Glyvrum og Ragnar Høgnesen úr Leirvík. Dagurin verður hildin við vælkomst í hølunum hjá Eldrafelagnum Nón, Torvgøta 2, Saltangará, frá kl. 18.



**Góða søta fitta mín**
Babba ynskir tær hjartaliga tillukku við 3 ára degnum



**Elskaða Rebekka**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum.
**Ynskja Oda omma og Páll abbi**



**Góði fitti Heini**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum í dag. Jesus pápi verið hjá tær. Omma og abbi elska teg.



**Góði Heini**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum í dag. Vit elska teg.
**Ynskja mostur og gubbi**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir



**Góði Dan**
Hjartaliga tillukku á 20 ára føðingardegnum 13. mars. Jesus-pápi vælsigni framtíð tína.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða fitta Malan Maria**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 13. mars. Jesus pápi verið hjá tær. Vit elska teg. Muss og klemm frá.
**Ommu, abba og Roy**



**Góði Heini**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum. Nú ert tú blivin stórur.
**Ynskja Hallur, gumma og gubbi**








**Góði Fríðfinnur**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum í dag.
**Ynskja mamma, babba, gumma og Brian**



**Góða kona og mamma**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Má Harrin signa framtíð tína.
**Maðurin og børnini**





**Elektrikkari ella líknandi søkist til SEV**

Ert tú elektrikkari, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving, hevur tú møguleika at fáa eitt sera spennandi, og til tíðir, krevjandi arbeiði í eini fyritøku í stórari menning innan eltekniska øki.

Tú verður partur av einum toymi, sum hevur ábyrgd av eltekniska útbúnaðinum á elverkum og koblingsstøðum kring alt landið.

Góð samstarvsevnir, og evnir at málbera teg í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum geva fyrimun

Sum umsøkjari til starvið hevur tú eisini fyrimun, um tú:
- Kennir til PLC, montering av hesum, og stýringar sum heild.
- Kennir til instrumentering og mátiteknikk.
- Hevur eina hándverksliga grundútbúgving innan el.
- Hevur evnir og áræði til at arbeiða sjálvstøðugt, og taka røttu avgerðirnar.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Eitt sera fjølbroytt arbeiði, har tú til tíðir kemur at arbeiða sjálvstøðugt
- Eitt arbeiði sum tú sjálvur er við at tilrættaleggja.
- Møguleika fyri bæði persónligari og fakligari menning.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har samstarv og smidleiki er eitt "must".

**Lønin:**
Lønin verður sambært seravtalu tengd at sáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag/Meistarafelagið og Handverkarafeløgini.

**Elfelagið SEV:**
Felagið, tú fer at arbeiða hjá, er interkommunala Elfelagið SEV, sum tekur sær av at streymveita allar Føroyar frá og við elframleiðsluni og til endaliga brúkaran. SEV hevur uml. 150 fólk í starvi, og á deildini har tú fer at arbeiða, eru frammanundan 3 verkfrøðingar og 2 elmontørar.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Finn Jakobsen, deildarstjóra ella Terja Nielsen, verkfrøðing á telefon 346800.

Umsóknir skulu saman við avritum av prógvum og møguligum ummælum sendast Elfelagnum SEV, postrúm 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi týsdagin, tann 4. apríl 2006.

Elfelagið SEV